HYGG HER

Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo

Brúktir bilar til sølu

Opel Vectra 2.2DTI
km. 75.000, svartur, okt'00
170.000,-

Citroen ZX 1.9TD 5h
km. 163.000, grønur, mai'97
85.000,-

Mitsubishi Galant 1.8i
km. 158.000, bláur, jun'89
35.000,-

Citroen Xantia 1.9td
km. 148.000, m-bláur, apr'98
120.000,-

Suzuki Baleno 1.3i
km. 27.500, gráur, apr'00
99.000,-

Citroen Berlingo 2.0HDI
km. 18.000, m.bláur, des'01
165.000,-

Citroen Xsara 1.9td
km. 23.000, m-bláur, mar'99
110.000,-

Citroen Saxo 1.5d
km. 57.000, grønur, feb'00
91.000,-

VØRUVOGNAR

Citroen Jumper 2,5TD
km. 120.000, reyður, aug'96
120.000,-

Nissan Serena 2,3D
km. 88.000, bláur, mai'97
88.000,-

Nissan Serena 2,3D
km. 102.000, bláur, mai'97
88.000,-

Møguleiki er eisini at royna nýggjar bilar

Vælkomin til
Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo

FAMILJU- OG HEILSUMÁLARÁÐIÐ

Fulltrúi til Familju- og heilsumálaráðið

Familju- og heilsumálaráðnum tørvar ein fulltrúa at byrja skjótast til ber.

Sum fulltrúi hjá okkum sleppur tú m.a.
- at hava ábyrgd av einari neyvari stýring av útreiðslunum til serviðgerð uttanlands
- at ráðgeva ávísum starvsfólkum innan sjúkrahúsverkið.
- at gera útrokningar sum fyri ein stóran part hevur við serviðgerð uttanlands at gera

Førleikakrøv:
Vit kundu hugsa okkum at viðkomandi hevði útbúgving frá hægri lærustovni, so sum cand. polit., cand. oecon. ella cand. scient. pol. Góður kunnleiki til teldur er ein fyrimunur. Tú dugir væl at samstarva, og hevur tú frammanundan kunnleika til heilsuøkið, er tað ein fyrimunur.

Starvið sum fulltrúi í Familju- og heilsumálaráðnum er áhugavert og mennandi við skiftandi og fjølbroyttum uppgávum. Starvið er sjálvstøðugt, og tú fært góðar møguleikar fyri framhaldandi eftirútbúgving.

Fyri framman standa nógvar stórar avbjóðingar viðvíkjandi fíggjarstýringini á familju- og heilsuøkinum. Talan er fyrst og fremst at fáa stýring á útreiðslunum til serviðgerð uttanlands, sum hesi seinastu árini er økt munandi. Serviðgerð uttanlands eru tær útreiðslur, sum landið hevur í samband við at sjúklingar verða sendir av landinum til viðgerðar, í flestu førum niður til Danmarkar á Ríkissjúkrahúsið.

Lønar- og setanartreytir:
Starvið verður sett sambært sáttmála ímillum Fíggjarmálaráðið og viðkomandi yrkisfelag.

Viðmerkjast skal, at setanin fevnir um Familju- og heilsumálaráðið og stovnar undir tí, umframt Løgmansskrivstovuna og onnur aðalstýri og verður skipað undir Familju- og heilsudeildini við tilvísing til Turid Arge, deildarstjóra.

Umsókn við avriti av prógvum o.ø. skal sendast til:

Familju- og heilsumálaráðið
Starvsfólkadeildin
Eirargarður 2
FO 100 Tórshavn.

Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 02. apríl 2003 kl. 12.00.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Turid Arge, deildarstjóra ella Aibritt á Plógv, aðalstjóra, tlf. 30 40 50

Havnar Sjúkrakassi

Umboðsval

Sambært § 28 í høvuðssamtyktini verður lýst til val hósdagin 15. apríl 2003.

4 umboð í Tórshavnar valdømi, 1 umboð í Hests valdømi og 1 umboð í Kaldbaks valdømi eru upp á val.

Uppskot til umboð skulu skrivliga verða sjúkrakassanum í hendi ikki seinni enn 1. apríl 2003.

Havnar Sjúkrakassi

Sumbiar kommuna

Til dagrøktina í Sumbiar Kommunu verður søkt eftir 2 dagrøktarum at byrja tann 1. apríl 2003. Harumframt verður søkt eftir einari dagrøktarmammu at arbeiða sum avloysara.

Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Kommunala Arbeiðsgevarafelag og Føroya Arbeiðarafelag.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Sumbiar Kommunu á tlf. 370344 ella 213552.

Umsóknirnar skulu vera Sumbiar Kommunu í hendi í seinasta lagi 28. mars 2003.

Sumbiar Kommuna
FO-970 Sumba
Tlf. 370344

Postverk Føroya

Frítíðaravloysarar m/k til Posthúsið í Saltangará

Søkt verður eftir frítíðaravloysarum m/k til Posthúsið í Saltangará at byrja sum skjótast.

Arbeiðið umfatar postútbering og postflutning.

Arbeiðstíðin kann liggja millum 07.00 og 20.00. Arbeitt verður mánadagar til fríggjadagar.

Førleikakrøv: Koyrikort.
Postverkið ynskir av tær, at tú ert álítandi, ágrýtin, stundislig/ur og positiv/ur.

Lønar- og setanarviðurskifti eru sambært sáttmála millum Føroya Landsstýri og Føroya Postfelag.

Roknast kann við at arbeiðið verður í tíðini uml. 7. apríl - 30. september 2003. Talan kann eisini verða um styttri tíðarskeið.

Umsóknir við tilhoyrandi skjølum vera at senda **skjótast gjørligt og í seinasta lagi 5. apríl 2003 til:**

Postverk Føroya
Posthúsleiðarin
600 Saltangará

Nærri fæst at vita frá posthúsleiðaranum mán- til fríggjadag á tlf. 44 75 57.

Bilførari

Vit søkja eftir bilførara/servicumanni at byrja skjótast tilber.

Vit bjóða:
- eitt spennandi og fjølbroytt starv í eini vinnu, sum er í vøkstri.
- tryggar arbeiðsumstøður
- gott arbeiðsumhvørvi

Arbeiði umfatar í høvuðsheitum:
- avskipað og koyra vindeygu og hurðar út til kundan
- at taka mát og vegleiða kundan á staðnum
- servicera og smáar umvælingar

Vit vænta av tær:
- at tú ert fyrikomandi og álitandi
- at tú hevur royndir við timbur/snikkaraarbeiði
- at tú hevur koyrikort, evt. stóra koyrikortið
- at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt

Løn:
Løn verður sambært avtalu.

Nærri fæst at vita við at venda sær til Heðin Poulsen tel. 33 21 77 ella 21 81 15

Vatnsoyra Snikkaravirki pf.
FO-385 Vatnsoyrar · Telefon 33 21 77 · Fax. 33 31 66
E-mail: vs-fg@h-window.fo · Homepage: www.h-window.fo

Vatnsoyra Snikkaravirki pf. er móðurfelag hjá Føroya Gluggi pf. í Miðvági. Felagini hava felags skrivstovuávgreiðslu. Vit framleiða vindeygu og hurðar úr timbur og plast og selja runt at landið. Í latuni eru vit 24 starvsfólk, hvørar 2. mentanar.

Útbjóðing

Í samband við bygging av vardum verkstaði og døgnumlætting í Sørvági verður:

BETONG-, TIMBUR- & SNIKKARAARBEIÐIÐ

hervið boðið út í almenna lisitatión.

Arbeiðið snýr seg í høvuðsheitum um nýbygging av uml. 230 m^2 og umbygging av uml. 100 m^3 í tveimum hæddum.

Útbjóðingartilfarið fæst við at venda sær til kommunuskrivstovuna í Sørvági frá hósdegnum hin 20. mars 2003, móti at flyta kr. 5.000,- á konto í Føroya Banka ella Føroya Sparikassa.

Tilboð í afturlatnum brævbjálva merktur »Vardur verkstaður og umlætting: Betong- Timbur- & Snikkaraarbeiði«, skulu vera Kommunuskrivstovuni í Sørvági í hendi seinast hin 17. apríl 2003. kl. 13.00.

Lisitatiónin verður sama dag kl. 13.30, har teir bjóðandi hava møguleika fyri at vera hjástaddir.

Sørvágs kommuna
tlf. 332004 · Fax 332952
t-postur: sorvag@sorvag.fo

Rætting

Av tí at dagfestingin og tíðirnar eru komnar skeivt fyri, verður aðalfundurin lýstur av nýggjum:

Aðalfundur

Føroya Lærarafelags og árligi limafundur hjá Stuðulsgrunni Lima Føroya Lærarafelags verða

leygardagin 3. mai 2003 kl. 10.00
á Føroya Læraraskúla

Fundarskrá sambært viðtøkum felagsins.

Innkomin mál skulu skrivliga vera komin til nevndina í seinasta lagi

leygardagin 12. apríl 2003 kl. 10.00.

Uppskot til valevni sum formaður og nevndarlimir skulu vera komin á skrivstovu felagsins í seinasta lagi

leygardagin 19. apríl 2003 kl. 10.00.

Føroya Lærarafelag

Hondlesing í Tórshavn

í døgunum 7.-9. apríl

Hondlesarin Marita er í Føroyum. Lesir tína hond – fortíð, nútíð og framtíð – styrki og veikleika. Ein øðrvísi máti at síggja teg sjálvan.

Ring og bið um tíð á
tlf. 0045 39664880 aftaná kl. 16.00

LANDSVERKFRØÐINGURIN

Leiðari til maskindeildina

Starvið sum leiðari av maskindeildini hjá stovninum er leyst at søkja.

Maskindeildin hevur um hendi maskinamboð, skerv- og asfaltútbúnað, akfør o.a. hjá stovninum, umframt viðlíkahald av asfaltgoymsluni í Hósvík. Amboðini eru í nýtslu kring landið – mest í sambandi við gerð og hald av landsvegum. Maskinmiðstøð er í Kollafirði og annars smiðja á Lambareiði, í Øravík og Hvannasundi. Eini 25 fólk tilsamans eru knýtt til hetta virksemið. Smiðjumeistarar hava dagliga raksturin um hendi.

Arbeiðsuppgávur
Viðkomandi hevur samskipanina av smiðjunum um hendi og hevur ábyrgdina av hesum virksemi.

Í høvuðsheitum er uppgávan hjá deildini rakstur av smiðjunum, viðlíkahald av maskinamboðum og útbúnaði, eykalutagoymsla, innkeyp av amboðum, eykalutum o.ø.

Førleikakrøv
Sóknast verður eftir maskinverkfrøðingi ella maskinmeistara og helst við royndum innan nevnda virkisøkið.

Setanarviðurskifti
Løn og setanartreytir annars vera sambært sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Umsóknir
Umsóknir við prógvum og møguligum ummælum verða senda Landsverkfrøðinginum, Postboks 798, 100 Tórshavn og skulu vera skrivstovuni í hendi í seinasta lagi 31. mars 2003. Merkið brævbjálvan »leiðari til maskindeildina«.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast frá Óla M. Petersen, deildarverkfr., á tlf. 31 13 33
e-postur: oli@lv.fo ella lv@lv.fo

TEKNISKI SKÚLIN TÓRSHAVN

Telduskeið á Kambsdali

Hósdagar kl. 17.00-21.00

Skeið	Dagar	Kostn.
Word	27/3, 3/4, 10/4, 24/4	2600
Excel	1/5, 8/5, 15/5, 22/5	2600

Tilmelding: áðrenn 25. mars 2003

Skeiðsdepilin við Marknagil
Marknagilsvegur 77, postsmoga 177, 110 Tórshavn
Tlf. 318813, fax 313374, t-postur dt@hsh.fo

KIRKJUBØAR KOMMUNA

Kunngerð

um framløgu av víðkan av byggisamtyktini fyri Kirkjubøar kommunu

Sambært løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir við seinri broytingum verður við hesum gjørt kunnugt, at broytingar í byggisamtykt/býarskipan fyri Kirkjubøar kommunu verða lagdar fram til almenna eftirskoðan í Sólarmagn á Velbastað, hvønn gerandisdag frá kl. 15.00 til 18.00, frá 19. mars 2003 til og við 9. apríl 2003 báðar dagar íroknaðir.

Víðkanin av verðandi byggisamtykt fevnir um hesi øki á Velbastað, sum verða løgd út til sethúsøki merk við B :
Partar av matr.nr. 51a og matr.nr. 5a, omanfyri ervavegin, frá telefonhúsinum norður til Hvíthjallar, verður lagt út til sethúsaøki.

Partar av matr. nr. 5a, 4a, 24 og 43d, frá Stórheyggi og norður til og við Bøllubrekku, millum bygdavegin og bøgarðarnar, verður lagt út til sethúsaøki.

Partar av matr.nr. 50a, 3a, 1a, 3d, 2a, 41a og 4a, sum er øki norðan fyri Ovara Roykheygg, millum vegin norður til Barnagarðin og landsvegin til Syðradals norður til Mígandalsá, verður lagt út til sethúsøki.

Hesi øki verða løgd út til Almenn Frítíðarøki, merkt við F :
Økið millum bøgarðin og landsvegin, burtur av matr.nr. 51a niðan fyri Hvíthjallar.
Økið millum landsvegin og vegin inn til Bøllubrekku, burtur av matr. nr. 50a.
Ovari Roykheyggur og nakað norður undir vegnum til Barnagarðin, burtur av matr. nr. 50a.
Økið niðanfyri matr. nr. 50æ, burtur av matr. nr. 50a.

Hesi øki verða løgd út til Almennar Stovnar merkt við E :
Partur av matr. nr. 50a, økið niðanfyri Sandheygg.
Partur av matr. nr. 50a, økið sunnanfyri Mígandalsá, millum landsvegin til Syðradals og sethúsini niðanfyri Barnagarðin.

Hesi øki verða broytt frá H øki til J øki:
Matr.nr. 2a Norðuri á Fløtum verður broytt frá H øki til J øki.

Víðkanin av verðandi byggisamtykt fevnir um hesi øki í Kirkjubø.
Partur av matr.nr. 21a í Kirkjubø.

Víst verður annars til framløgdu víðkanina av byggisamtykt hjá Kirkjubøar Kommunu, sum er galdandi fram til 31/12-2009.

Møgulig mótmæli og/ella broytingaruppskot, ið skulu vera skrivlig, mugu verða kommunustýrinum í hendi í seinasta lagi 11/6-2003.

Kirkjubøar Kommuna
FO-176 Velbastaður

Sosialurin
www.sosialurin.fo